# Perlan tikin í brúk á

**Leygardagin varð altjóða sálarheilsudagur hildin í Havn við almennum fundi, fyrilestrum og framsýning. Tað var Heðin Mortensen, borgarstjóri, sum setti dagin. Setanin fór fram í nýggja glasbygninginum hjá kommununi, Perluni, sum liggur millum Reinsaríið og Miðlahúsið**



Súsanna Olsen, leiðari á Daglonini, Heðin Mortensen, borgarstjóri og Arnhild Lauveng í Perluni á Sálarheilsudegnum

LAGT TIL RÆTTIS:
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Sinnisbati hevði gjørt nógv burtur úr altjóða sálarheilsudegnum. Staðið var Tórsgøta í miðbýnum í Tórshavn. Ikki færri enn tríggir bygningar í gøtuni lótu dyrnar upp leygardagin. Fyrst var Sálarheilsudagurin settur av borgarstjóranum í nýggju Perluni, og eftir tað varð trapputing, kjak í Miðlahúsinum, sum eisini varð sent beinleiðis á Rás2. Seinnapartin vórðu fyrilestrar í Perluni og sangur og framsýning í Posthúskjallaranum. Tað var norski sálarfrøðingurin Arnhild Lauveng, sum sjálv hevur verið skitzofren, sum varð komin til Føroyar at halda fyrilestrar.

Vit prenta her setanarrøðuna, sum Heðin Mortensen helt í Perluni.

"Vælkomin til Sálarheilsudagin 2009 og nýggju Perluna!

Først en særskilt velkomsthilsen til Arnhild Lauveng fra Norge. Du skal på dagen få en ganske særlig hilsen for din vennlige gestus at besøke os, og dele ut av dine erfaringer, når det gjelder recovery. Kanskje kann vi over dagen - via nynorsk, som er halv færøysk - finne ett mere hjemligt ord for dette begrepp. Men det viktige er, at du stiller opp og forteller din egen, sterkt personlige historie, om netopp recovery. At komme seg etter sykdom og ikke bare at fungere i samfunnet, men også att bli en bestseller og kapasitet på området. Velkommen til psykiatridagen vår, Arnhild!



*Grannabygningarnir speglast aftur í nýggju Perluni*

## Góðu áhoyrarar!

Hetta økið, vit eru í, er partur av gomlu Havnini. Hiðani stava nógvar søgur um smugling og loynihandil fyri øldum síðani. Vit kunnu siga, at hesin partur av Havnini, er hin hendingaríkasti og mest spennandi í øllum býnum. Heilt frá sjóvarmálanum við Vágsbotn og niðan gjøgnum øll skotini, niðan í hin livandi og grøna Grasagarð og heilt niðan í Varðholuna, har Havnarfólk goymdu seg fyri sjórænarum.

Hesa býarmynd, sum í dag er heilt ítøkilig og sjónlig fyri okkara eygum, kunnu vit føra yvir á tykkara átak, sum byrjar í dag, Sálarheilsudagin 2009.

Sálarheilsa og sálarsjúka eru hendingarík øki og lukkutíð eru mong, leik sum lærd, ið finna hesi somu øki spennandi. Tí fyri okkara eygum eru hesi øki oftast avbyrgd og tykjast fara fram í loyndum. Júst sum í loynihandilstíðini, sum blómaði í hesi fjaldu lagd, niðri í Havnini.

Men kanska er ein stórur partur av hesum bara mytir og sagnir. Vit vita tað ikki fyri vist og kunnu bara seta okkara álit á opna gransking, opna vitan og so vanligt forvitni.

Júst í hesi hugsan er tykkara átak, Sálarheilsudagurin 2009, eitt kærkomið tiltak.

Endamálið við Sálarheilsudegnum er at varpa ljós á viðurskifti hjá sálarsjúkum, umframt at upplýsa, hvat er myta og fakta á hesum øki. Eg skilji, at tit innan føroysku psykiatriina hava í felag valt yvirskriftina Recovery - at koma fyri seg